Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Árni Skaale, landsstýrismaður í fiskivinnumálum

Evni: Landingar hjá uppsjóvarskipum

Spurningar:

1. Hvørjar avbjóðingar eru við landingartørni hjá uppsjóvarskipum, sum fiska eftir svartkafti, makreli og sild, tá fiskaríið er í hæddini?
2. Er tað munur á skipum, sum hoyra til virkini, og skipum, sum ikki eru tengd at ávísum virki?
3. Metir landsstýrismaðurin, at tað er skilagott, at skip liggja upp til fleiri dagar og bíða eftir landingartørni?
4. Hvørjar loysnir sær landsstýrismaðurin fyri sær á hesum økinum, soleiðis at skipini sleppa aftur til fiskiskap sum skjótast?

Viðmerkingar:
Tað er javnan frammi, at skip eru noydd til at bíða eftir landingartørni, tá fiskaríið eftir uppsjóvarfiski er í hæddini. Tað er serliga torført, tá útlendsk uppsjóvarskip eisini landa í Føroyum.

Tað kann eisini gerast ein avbjóðing hjá skipunum, sum ikki hoyra til ávís virki, tí tey kunnu lætt enda aftast í landingarbíðirøðini. Hetta merkir, at tey ofta bíða longur. Viðhvørt skipar Fiskimálaráðið soleiðis fyri, at landast kann uttanlands í styttri tíðarskeið.

Tað er onki yvir at dylja, at tað er ein avbjóðing, um skip mugu bíða leingi. Bæði tí, at tað stjelur tíð frá fiskarínum, og tí at dygdin á fiskinum minkar fyri hvønn dag, ið gongur. Harvið selja skipini fyri verri prís.

Fiskaríið eftir svartkjafti er í hæddini, og tí koma nógv tons upp á land komandi tíðina. Veðrið hevur verið stak vánaligt og hevur hetta tarnað fiskiskapinum. Avbjóðingin er tó javnan, at skip mugu bíða í dagar eftir landingartørni.

Fyri at fáa at vita, hvat landsstýrismaðurin ætlar at gera við hesa afturvendandi avbjóðing, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 8. februar 2022

Jóhannis Joensen